UTTAN ÚR HEIMI

# Keypmannahavn fekk sína drotning

**Ritt Bjerregaard skúgvaði øll onnur til viks á kommunuvalinum í Keypmannahavn. Yvirhøvur høvdu Sosialdemokratarnir eitt gott val**

DANMARK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Ritt Bjerregaard og samgongufelagi hennara Klaus Bodan fegnast um sigurin*

*Mynd: Reuters*

Hon kom, sá og sigraði.

Tey gomlu, søguligu orðini kunnu av sonnum sigast um nýggja yvirborgarstjóran í Keypmannahavn, Ritt Bjerregaard.

Tað vakti ikki sørt ans, at hon, sum hevur búð í Odense tað mesta av sínum lívi, men tó er født í Keypmannahavn, valdi at stilla upp til kommunuvalið í høvuðsstaðnum. Meiri enn eina ferð varð hon eisini spurd, hvat hon ætlaði sær at gera har, og hvat hon kundi geva høvuðsstaðnum.

Men Ritt Bjerregaard er ikki nakar ársungi á tí politiska pallinum, og hon er heldur nikki hvør sum helst og tí heldur ikki nakar vanligur Odense-búgvi. Hennara drúgvu royndir sum fólkatingslimur, ráðharri og ES-kommiserur skuldu borga fyri, at hon eisini var før fyri at stýra einum býi, helt hon.

Tað mundu veljararnir eisini halda ella í hvussu er so nógvir teirra, at hon og Sosialdemokratarnir fingu eitt rimmar val í Keypmannahavn fyrradagin. Flokkurin fekk fimm umboð afturat í kommunustýrið og hevur nú 21 av teimum 55 sessunum har.

Undan valinum segði Ritt Bjerregaard, at hon ætlaði sær at fáa eina breiða býráðssamgongu, men teirri ætlanini slepti hon, tí samgongan, sum bleiv skipað longu valkvøldið, er so smøl, sum hon kann vera. Hon gjørdi av skipa samgongu saman við Radikala Vinstraflokkinum, og við hansara sjey limum afturat hevur sær hevur Ritt Bjerregaard júst tann neyðuga meirilutan, 28 av 55 limum. Sjálv verður hon yvirborgarstjóri, og oddamaðurin hjá teimum radikalu, Klaus Bondam, verður borgarstjóri við málsøkjunum umhvørvi, tøkni, barna- og ungdómsviðurskiftum.

### Pind av pinninum

Tann stóri taparin í Keypmannahavn var vinstramaðurin Søren Pind. Hann rak eitt hart og hvassorðað valstríð, men eftir øllum at døma tók hann ov rívan til og varð revsaður fyri tað. Revsingin var eisini hørð, tí Vinstri msti trý uimboð í kommunustýrinum og hevur bara átta.

Søren Pind valdi eisini at taka avleiðingarnar beinanvegin. Tá úrslitið var greitt, boðaði hann frá, at hann gevst. Hann segði seg hava gjørt sítt besta, men mátti ásanna, at tað var ikki nóg mikið. Tann nýggi oddamaðurin hjá Vinstra í Keypmannahavn eitur Martin Geertsen.



# Rukku næstan málinum

**Sosialdemokratarnir høvdu sett sær fyri at vinna valið í fýra teimum størstu býunum. Tað mundi lukkast**

DANMARK
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tað neit meint hjá sosialdemokratunum, at teir mistu borgarstjórasessin í Århus á valinum fyri fýra árum síðani, tí býurin hevði verið ein av háborgum floksins í mong Harrans ár við oddamonnum sum Thorkild Simonsen, borgarstjóra og Svend Auken, fólkatingsmanni.

Men fyrradagin eydnaðist tað at vinna borgarstjórasessin í landsins næststørsta býi aftur. Við oddavalevninum Nicolai Wammen og stuðuli frá SF og Einmdarlistanum eiga Sosialdemokratarnir aftur borgarstjóran í Århus.

Í Aalborg eydnaðist tað sum væntað flokkinum at varðveita borgarstjóran, Henning G. Jensen.

Harafturímóti mistu Sosialdemokratarnir valdið í Odense. Úrslitið har var, at tað stóð á jøvnum ímillum vinstravongin og teir borgarligu, og at tann einsamalli radikali býráðslimurin sum væntað gjørdust tungan á vágskálini. Og tá hann so valdi at styðja tann konservativa Jan Boye, og tí noyðist sosialdemokraturin Anker Boye at taka borgarstjóraketuna av sær.

Umframt í Keypmannahavn, Århus og Aalborg eiga Sosialdemokratarnir borgarstjóran í fleiri øðrum stórum býum so sum Kolding, Hosens, Vejle, Roskilde og Næstved.

*Nýggi sosialdemokratiski borgarstjórin í Århus Nicolai Wammen*

*Mynd: Reuters*